# Kendur gospelsangari á Eiði



**Hann er frá sama stati í USA sum amerikanski forsetin, men hann arbeiðir ikki í Washington, DC. Ístaðin ferðast hann kring heimin sum gospel-sangari, og hann hevur vitjað 22 lond við sínum væl dámda sangi**

KONSERT

Mikukvøldið var Larry Ford í ítróttarhøllini á Eiði, har hann sang frá hjartanum fyri einari mest sum fult settari høll.

Tað var onkur eiðismaður, sum helt fyri, at hann hevði ongantíð sær so nógvar bilar á Eiði fyrr. Og tað var kanska okkurt um tað, tí parkeringspláss vóru ikki at finna, og fólk vóru komin úr øllum landinum fyri at hoyra stóra og kenda gospel-sangaran Larry Ford.

– Eg havi vitjað fleiri lond, millum annað Amsterdam ... Nei, Holland! sigur Larry Ford á pallinum, áðrenn listin við øllum hinum londunum verður upp-róptur, millum annað Danmark.

Jú, hann er amerikanari, tað ivaðist ongin í. Men ongin tóktist heldur ivast í, at hann er gospel-sangari av øllum hansara hjarta. Fólkið tóktist liva seg rættuliga inn í gospel-rútmurnar, tá Larry Ford setti gongd á kórið og tónleikararnar, meðan hann sjálvur sang fyri.

Larry Ford kendi sín áskoðara og dugdi væl at fáa fjøldina við. Áskoðararnir í ítróttarhøllini á Eiði stóðu mangan uppi ístaðin fyri at sita niðri. Dúgliga varð klappað, meðan amerikanarin tónaði.

– Hann hevði eina fantastiska góða rødd. Eg nýtti løtuna. Tað varð ein ótrúliga góður stemningur, og fagnaðurin var ótrúliga góður, segði Tordur Niclasen, borgarstjóri á Eiði, um konsertina hjá Larry Ford á Eiði.

Tá Larry Ford ikki sang gospel, tosaði hann til fjøldina um boðskapin, sum hann við sanginum var komin fyri at fáa fram. Larry Ford hoyrir til kirkjuna "First Assembly of God" sum liggur í Fort Myers, Florida.

Larry Ford tosaði eisini um politikk. Hann segði millum annað, at tað kundi væl vera, at hann ikki var samdur í politikkinum hjá George W. Bush, forseta.

– Men eg eigi tveir synir, sum eru í Irak sum hermenn. Og eg stuðli teimum av øllum mínum hjarta, sigur Larry Ford, sum er giftur og eigur fimm synir og eina dóttir.

Hann er giftur við Sherryl Ford, og tey hava longu hildið 30 ára hjúnarbandsdag teirra.

Larry Ford byrjaði sum 15 ára gamal at syngja, og seinnu árini hevur hann verið at sæð á vælkendu Gaither-videoløgunum.

– Gud hevur givið Larry Ford eina ótrúliga rødd, og hann brúkar hana kring heimin við tí endamáli at fáa góða boðskapin fram: Gud er við okkum, sigur Gloria Gaither um Larry Ford.

– Eftir mínum tykki er Larry Ford tann besti tenorurin innan gospel-tónleik. Punktum, sigur James Blackwood um Larry Ford, sum nú hevur sungið fyri føroyingum.

Larry Ford duldi ikki fyri á konsertini á Eiði, at hann vil hava føroyingar at lurta eftir meira gospel. Við tí fyri eyga vísti hann á, at fólk kundu keypa fløgur frá honum.

Larry Ford heldur einar 150 konsertir um árið.




*Mikukvøldið var Larry Ford í ítróttarhøllini á Eiði, har hann sang frá hjartanum fyri einari mest sum fult settari høll. Tað var onkur eiðismaður, sum helt fyri, at hann hevði ongantíð sær so nógvar bilar á Eiði fyrr. Amerikanarin Larry Ford segði millum annað soleiðis á konsertini: - Eg havi vitjað fleiri lond, millum annað Amsterdam ... Nei, Holland!*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



EB/Streymur-VB 0-2 (0-0):

# VB fult fyri fyrstu ferð

**Tá ið heimaliðið royndi at trýsta fyri at fáa leiðsluna aftur, sum VB hevði syrgt fyri í 2. hálvleiki, var tað í staðin VB, sum økti til 2-0 og harvið fyri fyrstu ferð á árinum fekk fulla úrtøku**

FÓTBÓLTUR

*Jóannes Hansen*

Tað gongur ikki altíð, sum tað verður roknað við, og tað verður ikki altíð roknað soleiðis, sum tað eigur at verða roknað. Í EB/Streymi høvdu teir roknað við ikki torførari uppgávu, enn teir høvdu havt tríggjar tær fyrstu ferðirnar, tá ið teir megnaðu javnleik á heimavølli ímóti HB og á útivølli ímóti KÍ, og tá ið teir taptu stórt í Gundadali ímóti B36.

Men VB hevði lisið uppá. Venjarin, Hans Nielsen, hevði tikið avleiðingarnar av, at úrtøkan í teimum fyrstu royndunum ikki hevði verið nakað serlig. Verjan var tann, sum hon hevði verið frammanundan. Men bæði á miðvøllinum og í álopinum vóru onkrar skiftingar gjørdar. Jón Pauli Olsen, sum fyrr hevr verið tryggur sentralur miðvallari, men sum tey seinnu árini fyri tað mesta hevur verið í vinstra borði, og sum ofta hevur spælt í 2. deild, tí hann ikki hevur vant so nógv, var hesa ferð sentralur miðvallari saman við Milan Kuljic. Dan Djurhuus hevði hesa ferð fingið kjansin í álopinum undir liðini á Mindaugas, meðan Birgir Jørgensen leingi var á bonkinum.

Vágbingar vóru sannførandi. Serliga tí teir høvdu sera positivan hugburð. Í verjupartinum vóru teir sera tættir, og sjálvt um EB/Streymur serliga í 2. hálvleiki, eftir at VB var komið á odda, royndi at trýsta, so gekk tað ógvuliga striltið at spæla seg til málmøguleikar. VB vann nærdystirnar, og teir fingu stóra úrtøku. Einasta heilt upplagda møguleikan, sum teir misnýttu, var tá ið støðan framvegisvar 0-0. Símun Samuelsen, sum aftur hevur fingið landsliðsboð, og sum hesa ferð var ytstur á miðvøllinum í vinstru, var púra blankur, tá ið hann við høvdinum skuldi stýra bóltinum í málið, men royndin fór omanfyri tvørtræið aftanfyri Gunnar á Steig.

EB/Streymur var ikki á sama hátt tunað til hesa uppgávuna, sum teir hava verið undanfarnu ferðirnar. Teir spældu seg ikki til stórvegis upplagdar málmøguleikar. Onkra ferðina royndu teir uti frá, men tað var oftast barnamatur hjá Bjarna Johansen í VB málinum.

Á EB/Streyma miðvøllinum var Nicu Dogaru nýgjur maður. Hetta var fyrsta ferðin, hann var á liðnum, eftir at hann er fluttur úr HB og til Eiðis. At Nicu var komin til EBStreym hevði í hesum førinum kostað Bárði Olsen miðvallarplássið í høgru. Tað varð lagt til merkis av áskoðarunum, tí Bárður Olsen átti næstsíðsta fótin á í báðum førum, tá ið EB/Streymur fekk tvey mál í Klaksvík síðsta sunnudag.

### Málini

Bæði málini komu eftir steðgin. Í fyrra førinum var málverjin hjá heimaliðnum eitt sindur blandaður upp í. Símun Samuelsen sendi hornaspark úr vinstru og yvir um handara stólpan. Á baklinjuni stýrdi Palli Augustinussen bóltin inn fyri aftur málið. Málverjin tóktist hava tak á støðuni, men hann misti út frá aftur, og so sendi Anders Nielsen í málið.

Í seinna førinum vóru heilt fáar statiónir frá VB málinum, og inntil bólturin lá í meskunum hinumegin. Bjarni Johansen sendi málspark í vinstra borð til Símun Samuelsen, sum stakk fram til Mindaugas. Hann fór sjálvur og setti bóltin í málið.

EB/Streymur royndi at koma afturíaftur, men tað segði tað sama. Tá ið tað ikki eydnaðist at spæla seg til møguleikar, fóru teir at senda langar bóltar fram til Sorin Anghel, og tað var barnamatur hjá tryggu miðverjuni hjá VB.

Heimatapið ber við sær, at samansetta liðið er ikki so lítið kroyst, áðrenn teir næstu ferð skulu til Gøtu. Hjá vágbingum tykjast fyritreytirnar betri at fáa góða nyttu burtur úr stóra potentialinum, sum tykist vera í liðnum. Í fimta umfarinum fáa teir vitjan av ÍF.



*Í EB/Streymi eru teir ikki so lítið kroystir, eftir at heimadysturin móti VB einki kastaði av sær*

## Fakta um dystin

**EB/Streymur-VB 0-2 (0-0)**
0-1: Anders Sørensen
0-2: Mindaugas
Dómari: Petur Skarðenni
EB/Streymur: Gunnar á Steig — Esmar Eiðisgarð (Jóhan á Stongum, 69.), Fróði Clementsen, Andrey Pazek, Carl H. Høgnesen — Nico Dugaro, Hans Pauli Samuelsen, Jákup Martin Joensen (Bárður Olsen, 60.), Knút Vesturtún (Marni Djurhuus, 73.) — Sonni L. Petersen, Sorin Anghel
Gult kort: eingin
VB: Bjarni Johansen — Mortan úr Hørg, Anders Sørensen, Eyðun Jacobsen, Darius ?? — Palli Augustinussen (Birgir Jørgensen, 79.), Jón Pauli Olsen (Poul N. Poulsen, 89.), Milan Kuljic, Símun Samuelsen — Mindaugas (Jàkup Olsen, 88.), Dan Djurhuus
Gult kort: eingin

## Súni Fríði ongan veg



Í hósdagsútgávu okkara nevndu vit, at tað vóru ábendingar um, at Súni Fríði Barðá møguliga fór til KÍ at leika.

Norðlýsið skrivaði tó fríggjadagin á heimasíðuni, at samráðingarnar millum KÍ og Súna Fríða endaðu úrslitaleysar, og at ætlaða skiftið tí verður av ongum.

Frá álítandi keldm sigur Norðlýsið seg vita, at partarnir tosaðu ítøkuliga um ein sáttmála, men at leikarin vrakaði hendan.

**-jm**

## Heimasíða til vespu-fjepparar

Seinastu árini hava sonevndu Guliganz fylgt við alla staðni, har NSÍ hevur ferðast. Eisini hava hesir fjepparanir hjá NSÍ havt eina heimasíðu, men hendan er nú komin á netið í spildurnýggjari útgávu.

Umframt tíðindi, myndir, hugrák, upplýsingar um Guliganz og annað kunnandi tilfar, bjóðar nýggja Guliganz-heimasíðan eisini teimum vitjandi at kjakast. Treytin er tó, at tú melda teg til, men annars er orðið í síni breiðastu merking frítt, so leingi fólk duga sær hógv. Og so ber sjálvandi eisini til hjá áhugaðum at tekna seg sum lim hjá guliganz.

Slóðin til nýggju heimasíðuna er www.guliganz.fo




**-jm**